# Drál og eitt gott tilboð

**Politiskt drál at einskilja størri part av Atlantsflog og eitt tilboð frá einum av stóru privatu partaeigarunum í felagnum vóru grundgevingarnar hjá nevndini í Atlantic Airways fyri at keypa partabrøv hjá leiðsluni til yvirkurs**



*Sambært nevndarformanninum í Atlantic Airways, Christian Andreasen, metti nevndin bestu loysnina fyri Atlantic Airways vera, at felagið keypti partabrøv frá leiðsluni fyri yvirkurs*

PARTABRØV
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Eftir at Rás2 og Sosialurin varpaðu ljós á, at nevndin í Atlantsflog keypti tilsamans 11.111 partabrøv frá leiðsluni fyri góðar 230.000 krónur meira enn partabrøvini vóru verd, bað Bjørt Samuelsen nevndina í felagnum um eina frágreiðing.

Í frágreiðingini, sum Rás2 og Sosialurin nú hava fingið innlit í, peikar Christian Andreasen á politisku óvissuna um, hvørt størri partur av Atlantsflog verður einskildur. Nevndarformaðurin vísir á, at tá felagið varð skrásett á keypsskálanum og fyrsti triðingurin var einskildur, boðaði Vinnumálaráðið frá, at ætlanin var at halda fram at einskilja felagið.

Millum annað út frá hesum fortreytum keypti leiðslan tilsamans 22.222 partabrøv fyri tilsamans 5,8 milliónir krónur. Men eftir at nýtt landsstýri tók við, er støðan broytt, staðfestir nevndarformaðurin, sum í frágreiðing til Bjørt Samuelsen millum annað skrivar soleiðis:

– Vinnumálaráðharrin hevur á fundi við leiðslu felagsins boðað frá, at tað er óvist, um tað í løtuni er politiskur vilji at einskilja upp til tveir triðingar av partapeningi felagsins.

### Høvdu annað tilboð

Víðari skrivar Christian Andreasen, at 14. juni boðaði leiðslan í Atlantsflog nevndini frá, at hon hevði í umbúna at umskipa síni ognarviðurskifti í felagnum. Leiðslan upplýsti fyri felagnum, at hon hevði fingið eitt keypstilboð frá einum av stóru, privatu partaeigarunum í Atlantsflog, sum vildi keypa partabrøvini frá leiðsluni fyri kurs 261.

Christian Andreasen nevnir í frágreiðingini einki um, hvat felag talan er um, men einans at høvuðspartaeigarin í keypandi felagnum eisini hevur handilsligt samband við felagið.

Men nevndin í Atlantsflog ynskti ikki, at leiðslan skuldi sleppa at selja til hetta felag. Orsøkin var, sambært Christiani Andreasen, at spurnartekin tá møguliga kundi setast við, hvussu óheft leiðslan fór at gerast mótvegis viðkomandi partaeigara - um also leiðslan seldi sín partapening til viðkomandi íleggjara og gjørdist minnilutaeigari í keypandi felagnum.

### Sigur einki um avleiðingar

Eftir hetta vórðu samráðingar tiknar upp millum nevnd og leiðslu um at Atlantsflog sjálvt kundi keypa partabrøvini frá leiðsluni. Úrslitið av hesum bleiv, sum kunnugt, at Atlantsflog keypti helvtina av øllum partabrøvunum hjá leiðsluni fyri kurs 240. Tað eru 10 prosent hægri enn kursurin á virðisbræavamarknaðinum var sama dag.

Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í vinnumálum, umboðar tveir triðingar av partapeninginum í Atlantic Airways. Hon segði á Rás2 í gjár, at hon tekur frágreiðingina frá nevndini til eftirtektar, men hon vildi ikki siga, um ella hvørjar avleiðingar málið møguliga fær.

# Tey gera film í Føroyum

**Ein filmsbólkur fer í August at gera ein film um ung fólk í Føroyum**

FILMUR
*Bjørk Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*

Sunnudagin fer ein filmsbólkur úr Gorgeous Enterprise í Englandi at søkja eftir ungum føroyingum, ið skulu leika í filminum. Ætlanin er at gera ein film uttan dialogum. Tað vil siga, at tað verða bara myndir og tónleikur.

Sunnudagin frá klokkan hálvgum trý til klokkan seks, verður møguleiki hjá ungum føroyingum at fara niðan í Norðurlandahúsið at royna seg sum sjónleikara. Tað er ikki eitt krav, at tú skal vera royndur sjónleikar – men at tú ert natúrligur og ungur. Gentur skulu koma við lítlari sminku. Eisini søkja tey eina tilkomna kvinnu millum 25 og 40 ár, ið skal eygleiða tey ungu og vera sjálvsikkur. Filmurin fer at lýsa døgnið hjá ungum í Føroyum til tónleikin hjá Torp larsen, Rune Funch og Kristoffer Sonne.

Filmsbólkurin fer at filma í Føroyum frá 9. til 18. august.




